Sosialurin
# VARPIÐ
FRÍGGJADAGUR 10. mars 2006



**Extraordinary Pets**
Ein maður fer undir brúsuna við sinum tikara, ein kvinna hevur ein giraff í havanum og so fara vit eisini til borðs, til amerikanska "thanksgiving-døgverða", við krokodillum! Vit hitta ánararnar av hesum eksotisku kelidjórunum. T.d. Adam Fisherman, sum eigur ein bengalskan tikara.

**Sunnudag 12. kl. 19.00**



**Dinas Dates - Naser Khader**
30 ára gamla Dina hittir ymiskar kendar, danskar menn fyri at gerast klókari uppá mótsatta kynið. Dina hittir menn undir romantiskum umstøðum á matstovu. Sendirøðin er lýst sum "talkshow" og hevur ein lættan dám av ironi yvir sær. Í kvøld hevur Dina sent Naseri Khader ástfundarboð.

**Hósdag 16. kl. 21.00**

**Bloody Sunday**
30. januar 1972 var ikki ein dagur sum allir aðrir undir stríðnum í Írlandi. Politikarin Ivan Cooper hevur skipað fyri einari friðarligari mótmælisgongu í Derry at mótmæla, at so nógvir norðurírar verða settir fastir av enska herinum. Onglendingarnir stúra fyri ófriði og seta fallskíggjahermenn á varðhald. At enda er støðan so spent, at ófriður brestur á. Skotið verður við skørpum og 13 fólk lata lív. Filmurin fortelur so nágreiniliga sum til ber um tað, sum hendi henda vanlukkuliga sunnudag, sum gjørdi yvirgangin í Norðurírlandi og Onglandi til gerandishendingar.

**Týsdag 14. kl. 21.30**

Televarpið
Fleiri rásir - einki roks
**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**